# Spælararnir eru ikki nóg væl fyri til stóru avbjóðingarnar

**Buldrið og brakið undan fyrsta umfarinum eigur at bera við sær, at leisturin við at hava týdningarmiklar dystir Dýra biðjudag og sunnudagin, sum er tveir dagar aftaná, eigur at verða tikið til nýggja viðgerð**

SAMANUM 1. UMFAR
*Jóannes Hansen*



*GÍ og KÍ høvdu eitt strævið vikuskifti við dysti fríggjadag og sunnudag. FSF skuldi umhugsa at givið leikarunum meira hvíld millum dystirnar.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir langa upphiting í bólkaumfarinum í steypakappingini var í vikuskiftinum av álvara ferð sett á fótbóltsárið. Burtursæð frá rimmar hálvfinaluni í Gøtu, so vóru leikligu avrikini einki at reypa hurrá fyri. Í øllum fimm landskappingardystunum varð tað sparkað meiri, enn tað var spælt. Á Eiði og í Gundadali vórðu fýra mál skorað, meðan samlaða talið í hinum trimum dystunum var trý. Í fleiri førum stóðust málini av mistøkum í verjuni, heldur enn av snildum og væl upphugsaðum álopsspæli.

At leikdygdin ikki er góð, nú mai mánaði er meiri enn hálvrunnin, er vert at hugsa um. Tað hevur verið spælt og kappast í bólkaumfarinum í steypakappingini síðani 22. mars, men í nógv teimum flestu førunum tykjast spælararnir ikki enn at vera tunaðir til neyvt og ferðmikið spæl. Kappingin um Løgmanssteypið hevur altso ikki hvest fótbóltsspælið nóg nógv, og tað eigur at vera tilfar til sodningar.

Nú var talan í vikuskiftinum um fyrsta umfarið, og nógv kann fáast í rættlag næstu vikurnar. Men tað er eisini neyðugt, tí tað standa stórar avbjóðingar fyri framman. Tað eru átjan dagar, inntil landsliðið skal royna seg í Reykjavík, og Týsklands vitjanin er bara 22 dagar burtur.

## Ólavsøkufinalan

Í steypakappingini gjørdist tað sunnudagin greitt, at B36 og GÍ skulu spæla steypafinalu á ólavsøku. Hetta er fyrsta ferðin yvirhøvur, at hesi bæði feløgini sama ár hava spælt seg í finaluna. Felags fyri bæði B36 og GÍ er, at tey eiga hvør sín lut í Løgmanssteypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999. Tað liðið, sum fer at enda omaná ólavsøkudag, verður tað fyrsta, sum fer at eiga tveir lutir í steypinum, sum tað skal spælast um til og við 2008 – um ikki okkurt felag longu frammanundan hevur vunnið tað til ognar. Higartil hevur lítið bent á, at tað skal laga seg soleiðis.

GÍ var annar parturin av sonnum steypadrama í Gøtu, meðan B36 eyðmýkti KÍ. Hesir báðir dystirnir eiga at verða tiknir við, tá ið fyrsta umfarið í landskappingini verður vigað við tí fyri eyga at meta um, hvussu tey tíggju í bestu deildini eru fyri.

## Tepurt hjá fleiri

GÍ avrikið sunnudagin vísti aðra síðu av gøtumonnum, enn tað, sum sást fríggjadagin. Tá vóru teir rættuliga máttleysir og tunnir. Í tí førinum vóru Gidek og Súni Olsen ikki við. Gidek var við sunnudagin, og tað hevði stóran týdning.

Serliga eftir eyðmýkingina í steypadystinum ímóti B36 munnu tey trý stigini, sum KÍ fekk í Gøtu fríggjadagin, kennast sum søtur biti. Klaksvíkingar kunnu ikki á nakran hátt bera í bøtuflaka fyri 7–1 heimatapinum. Men uppgerðin vísti, at á sama hátt sum hjá GÍ, so kemur tað sera illa við hjá KÍ, at lyklaspælarar eru burtur frá. Hesa ferð saknaðu teir Allan Joensen, Aleksander Djordjevic og í 2. hálvleiki Ova Nysted, og uttan teir leið KÍ skipbrot.

At allir fara at verða tøkir alla tíðina, inntil kappingarárið verður av síðst í september, er ov bjartskygd at rokna við. Tað tykist sum um, at tað bæði í KÍ og GÍ er so mikið tepurt við tilfari, at gongdin frameftir er treytað av, at lyklaspælararnir sleppa undan skaðum og leikbannum. Serliga gøtumenn hava í steypakappingini víst, at teir kunnu røkka langt, um teir hava allar teir bestu tøkar, og so skal avrikið fríggjadagin eisini síggjast í ljósinum av, at GÍ hevði hálvfinaluna tveir dagar seinni at hugsa um.

## Líta á teir ungu

Tað er rættuliga ymiskt, hvussu venjarar takla støðuna, tá ið tað berst føstu monnunum frá. Undanfarin ár hevur aftur og aftur verið at sæð, at royndir spælarar, sum hava sett skógvarnar á hillina, verða gravaðir fram aftur, heldur enn at ungir spælarar hava fingið møguleikan.

Í vikuskiftinum var sjón fyri søgn, at fleiri venjarar hveppa seg ikki við at geva ungu monnunum møguleikan. Dømi um hetta eru GÍ og NSÍ venjarin, sum vístu ungum monnum álit. Tað man fara at loysa seg í longdini, sjálvt um tað kostar eitt sindur fram á leiðini. Í Klaksvík eigur tað at vera hugsunarvert, at liðið, sum eftir steðgin legði rygg til B36 eyðmýkingina, fyri ein stóran part var mannað við spælarum, sum eru farnir um besta fótbóltsaldurin.

## VB oftast málleyst

Undan kappingarbyrjan hevur B36 verið roknað millum favorittarnar. Tað eru teir framvegis. Málleysur javnleikur í Vági er ikki so galið úrslit. Í fjør endaðu fimm dystir málleysir. VB var fýra ferðir annar parturin av 0–0 dystunum, og í trimum av førunum var hetta á Vágseiði. B36 tapti 2–1 í Vági í fjør, so hóast árstalsfelagið ikki er at finna millum teir fremstu á fyrstu støðutalvuni, so vísti vikuskiftið, at tað skal roknast við teimum.

HB gjørdi sítt í Gundadali ímóti FS Vágum, NSÍ sítt í Runavík ímóti Skála, og bæði EB/Streymur og B68 kunnu liva við javnleikinum á Mølini.

Skála hevur verið tippað sum mest upplagda boðið upp á niðurflyting. Í Runavík sást, at tað neyvan stendur so heilt illa til, sum tað kanska hevur verið róð framundir. Men spælihugurin og sjálvsálitið hjá skálamonnum restina av sumrinum man vera treytað av, at teir um ikki so langa tíð fáa okkurt stigið, og soleiðis er tað hja øllum hinum eisini.

## Eiga at umhugsa skránna

Undan vikuskiftinum gjørdu GÍ og KÍ stóran vørr, tí teirra landskappingardystur varð fluttur frá hóskvøldinum og til fríggjadagin. Tað tóktist meiri vera mannagongdin enn sjálvt flytingin, sum teir ilskaðust inn á.

Men tað hevði kanska verið upp á sítt pláss, um leisturin við landskappingarumfari Dýra biðjudag og hálvfinalum tveir dagar seinni hevði verið tikin til nýggja viðgerð. At bara tveir dagar eru ímillum týdningarmiklar uppgerðir so tíðliga á árinum er púra óneyðugt.

Í skránni er lagt upp til, at fleiri landskappingardystir verða spældir mitt í viku. Tað er ein fín skipan, og tað hevði einki gjørt, um eitt umfar í landskappingini var Dýra biðjudag, og at hálvfinalurnar vóru t. d. týskvøld og mikukvøld. Tann broytingin hevði havt við sær, at spælararnir fingu longri hvíld millum dystirnar, og so hevði tað eisini dryppað av til bløðini, sum høvdu havt møguleika at fylgt betri við og spjatt fótbóltstifarið yvir fleiri útgávudagar.

**Støðan 1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | HB | 3-1 | 3 |
| 2. | NSÍ | 2-0 | 3 |
| 3. | KÍ | 1-0 | 3 |
| 4. | EB/St | 2-2 | 1 |
| 5. | B68 | 2-2 | 1 |
| 6. | B36 | 0-0 | 1 |
| 7. | VB | 0-0 | 1 |
| 8. | GÍ | 0-1 | 0 |
| 9. | FSV | 1-3 | 0 |
| 10 | Skála | 0-2 | 0 |



# B36 skrædlaði klaksvíkingar

**Jákup á Borg heldur, at KÍ átti at havt hugsað meiri um æruna í 2. hálvleiki, enn nógvir av spælarunum tóktust gera, og KÍ venjarin vildi ynskt, at tað var sunnudagur aftur í morgin, so fyrsta stigið at vaska skommina burtur kundi verið tikið**

HÁLVFINALA
*Jóannes Hansen*



Leikluturin hjá KÍ í kappingini um Løgmanssteypið er av á hesum sinni. Í sær sjálvum er tað ikki nakað nýtt. Eftir at KÍ av álvara spenti álopsbogan í Gundadali í vónini um at broyta 3–1 til 3–2 og í staðin fekk eitt mál ímóti sær, so B36 var frammanfyri 4–1, tá ið teir sunnudagin vitjaðu í Klaksvík, lá tað í kortunum, at tað var B36, sum skuldi verða annar parturin í ólavsøkufinaluni, og soleiðis verður tað.

Søgan er, at B36 í fótbóltsmekkanum hjá klaksvíkingingum gjørdi fullkomuliga, sum teir vildu og fult og heilt klæddu heimaliðið av við 7–1 sigri. Í steðginum var støðan 2–0, og í 2. hálvleiki skoraðu havnarmenninir fimm ferðir, áðrenn Hjalgrím Elttør pyntaði um.

Talan er um ógvusligasta úrslitið í hálvfinaluni, síðani tað fyrstu ferð varð spælt um Løgmanssteypið í 1989. Og tað var um reppið, at KÍ metið fyri heimatapi í nýggjari tíð fall. Men málið hjá Hjalgrími bar sama úrslit við sær, sum í minniliga landskappingardystinum á Norðoyastevnu í 1989, tá ið tað var HB, sum vann 7–1.

## Góvu skarvin yvir

Klaksvíkingar tóktust ætla sær at fáa fleiri mál og harvið hótta viðførið, sum B36 hevði við norður. KÍ útgangsstøðan líktist nógv 3–3–4. Men dysturin var ikki gamal, tá ið allir KÍ dreymar um steypafótbólt á Ólavsøku vóru horvnir sum døgg fyri sól. Sonny Johansen og Heðin á Lakjuni skoraðu B36 málini í 1. hálvleiki, og harvið var spurningurin, hvussu stórur B36 sigurin fór at verða.

Klaksvíkingar tóktust ikki í steðginum at hava ásannað, at alt var tapt, og at málið nú skuldi verða at spæla fyri at fáa eitt so heiðurligt úrslit, sum tað bar til. Verjuspælararnir vóru frammarlaga á vøllinum, og tá ið teir ikki megnaðu at renna kapp við Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni, segði tað seg sjálvt, at málini skolaðu ígjøgnum hjá Kartini Joensen, sum ferð eftir ferð var fullkomuliga prísgivin.

KÍ gav stutt sagt skarvin yvir. Fleiri spælarar hildu uppat at gera nakað til nyttu, og tað tóktist ikki vera orka til at hugsa um æruna.

– Tað var týðuligt, at teir punkteraðu, tá ið við tíðliga í 1. hálvleiki høvdu skorað tvey mál. Men tað undrar meg, at teir ikki stríddust fyri æruni. Eg hevði í hvussu so er ongantíð funnið meg í tí, um liðið hjá mær í hvussu so er ikki royndi at spæla fyri æruni, er viðmerkingin hjá Jákupi á Borg, sum sjáldan áður hevur upplivað at hava so stórt pláss at dusa sær á, sum hann hevði í Klaksvík sunnudagin.

Roknar tú við, at leikluturin hjá KÍ í ár verður lítil?

– Fótbóltur er eitt undarligt spæl. At tað gongst av skriðuni ein dag, er ikki tað sama sum, at tað fer at ganga illa í næstu royndunum. GÍ vann steypabólkin, sum vit vóru í. Tá ið teir vitjaðu okkum í Gundadali, vunnu vit 5–1. Eg rokni faktiskt við, at bæði KÍ og GÍ fara at gera um seg í landskappingini, men sjálvandi er tað ikki bara sum at siga tað at vaska ein sovornan blett av sum 7–1 tap – bæði hjá spælarunum og hjá felagnum í síni heild, heldur ein av landsliðsspælarunum hjá B36.

## Skommin skal vaskast burtur

Nýggi KÍ venjarin, Jan Joensen, ynskir ikki at fjala yvir tað, sum gekk fyri seg:

– Hatta var ein stór skomm. Eg vildi ynskt, at tað var sunnudagur aftur í morgin, so næsti landskappingardysturin var á skránni, og vit harvið fingu møguleikan at fara undir fyrsta partin av at vaska burtur. 7–1 tap á heimavølli hvørvur ikki beinanvegin, men vit mugu gera tað, sum vit kunnu, og tað er gott, at tað verður á heimavølli, at vit sunnudagin fáa møguleika at vísa, at vit eru betri enn tað, sum varð víst ímóti B36.

Úrslitini siga, at tit hava stórar trupulleikar í verjuspælinum?

– Hesa ferð var alt ein stórur trupulleiki. Kanska vit vóru so væl nøgdir við sigurin í Gøtu, og so trúðu spælararnir ikki upp á, at vit kundu pressa B36 og kanska skapa spenning um samlaða úrslitið. Teir fluttu seg væl og nógv, meðan vit alla tíðina vóru í millumstøðum. Fleiri av málunum í 2. hálvleiki mintu um piltaliðsfótbólt. Jú, tað var eyðmýkjandi, og verjuspælið er ikki gott. Tað siga úrslitini eisini.

Men hava tit møguleika at rætta upp á tingini?

– Allan Joensen verður við aftur sunnudagin, og vit vóna, at Ove Nysted verður tøkur. Aleksander Djordjevic verður ikki tøkur ímóti VB. Men tað ræður um hjá okkum øllum at koma fyri okkum aftur og at fáa sjálvsálitið upp á pláss aftur. Skulu vit fáa nyttu burturúr sigrunum, sum vit vinna á útivølli, so mugu heimadystirnir vinnast. Ikki minst tann ímóti VB. Tað vita vit allir, sigur sera vónbrotni KÍ venjarin.

**KÍ–B36 1–7 (0–2)**

0–1: Sonny Johansen
0–2: Heðin á Lakjuni
0–3: Jákup á Borg
0–4: Jákup á Borg
0–5: John Petersen
0–6: Heðin á Lakjuni
0–7: sjálvmál
1–7: Hjalgrím Elttør
B36 í finaluna við málmuninum 11–2

**KÍ:** Kartin Joesen – Sámal Eyðfinn Akursmørk (Eyðun Klakstein, 46.), Ove Nysted (Olgar Danielsen, 62.) (Eyðun Klakstein, 46.), Jan Andreasen – Fríðin Ziskason, Símun Joensen (Jan Joensen, 46.), Harley Bertholdsen – Atli Danielsen, Erling Fles, Hjalgrím Elttør, Arnold Joensen

**B36:** Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Fróði Clementsen, Kenneth Jacobsen – Jákup á Borg, Julian Johnsson, Sverrir Kjærbo, Heðin á Lakjuni – John Petersen, Sonny Johansen

# Tað er rok í Molde

**Venjarin í Molde er undir hørðum trýsti frá áskoðarunum, sum biðja hann siga seg úr starvi vegna vánalig úrslit**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin var Molde við Jákupi Mikkelsen á beinkinum fyri lemjandi ósigri í bestu norsku deildini. Molde tapti heili 3-0 á útivølli móti Bryne, og nú krevja áskoðararnir, at høvdini rulla. Jákup kom ikki á vøllin í hesum dystinum.

Venjarin Gunder Bengtsson hevur verið undir sera hørðum trýsti seinastu dagarnar, og fjølmiðlarnir hava eisini funnist harðliga at svenska venjaranum, sum saman við Kalle Bjørklund hevur ábyrgdina av liðnum.

Sunnudagin hevði nevndin í Molde kreppufund, men hon valdi ikki at siga venjaranum úr starvi. Fjølmiðlarnir vilja vera við, at orsøkin til tað er, at venjararnir hava tvey ár eftir av sáttmálanum, og felagið hevði skulað rindað teimum umleið fýra milliónir krónur fyri sáttmálaskeiðið umframt at fáa ein nýggjan venjara inn.

## Kreppuloysn

Nevndin hevur tó tikið vánaligu úrslitini til eftirtektar og hevur sett eina kreppuætlan í verk. Nevndin hevur tí sett eina nevnd við fyrrverandi spælarum og nevndarlimum hjá felagnum, og teir skulu nú hjálpa venjaranum at fáa skútuna á rættkjøl. Hon skal nú seta tiltøk í verk, men enn er ikki greitt, hvørji hesi tiltøkini vera.

Molde hevur bert fingið fimm stig í seks teimum fyrstu dystunum í ár, og hetta kann felagið als ikki liva við.

– Vit mugu gera okkurt. Vit kunnu ikki liva við hesum óskilinum, sum hevur valdað seinastu tíðina, sigur Bertil Stranden, sum er ítróttarstjóri í felagnum og limur í kreppunevndini.

Fleiri leikarar hava gjørt vart við sína ónøgd seinastu tíðina, og lagið hevur verið í botni allastaðni í felagnum.